Bjarni Hammer
vegna Javnaðarflokkin

Løgtingið

Løgtingsmál nr. /2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin) (Nágreinan av § 119, stk. 1)

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)
(Nágreinan av § 119, stk. 1)

§ 1

Í Revsilógini, sambært lovbekendtgørelse nr. 215 af 24. juni 1939 om straffeloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 7. mai 2019, verður § 119, stk. 1, 1. pkt. orðað soleiðis:

"Tann, sum antin fremur harðskap, hóttir við at fremja harðskap, ella sum alment ella við stórari útbreiðslu í hyggju setir fram hóttan um harðskap ímóti persóni, ímeðan ella í sambandi við, at hesin persónur útinnir honum alment álagda tænastuskyldu ella starvsskyldu, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp til 8 ár."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Endamálið við uppskotinum er at nágreina § 119, stk. 1 í revsilógini, eftir at Eystari Landsrættur hevur staðfest dóm hjá Føroya Rætti um at frídøma ákærda fyri harðskap ímóti løgreglumanni, tí rætturin metti ikki heimildina fyri at revsa eftir ásetingini vera nóg greiða.

Málsøkið revsirættur varð yvirtikið 1. mars 2010, og síðani hevur verið arbeitt við at týða revsilógina til føroyskt. Við løgtingslóg nr. 50 frá 7. mai 2019 vórðu kapitlarnir 14 – 19 føroyskaðir (løgtingsmál 108/2018).

§ 119, stk. 1 í kapitli 14 snýr seg um harðskap ella hóttanir ímóti persóni, sum útinnir álagda tænastu- ella starvsskyldu, og er soljóðandi:

> *".. Tann, sum antin við harðskapi ella við hóttan um harðskap, ella sum alment ella við stórari útbreiðslu í hyggju setir fram hóttan um harðskap ímóti persóni, ímeðan ella í sambandi við at hesin persónur útinnir honum alemnt álagda tænastuskyldu ella starvsskyldu, verður revsaður við sekt ella fongsli upp til 8 ár."*

§ 119 er ein serlig revsirættarlig verja av persónum, sum virka í tænastu ella starvi fyri hitt almenna. Orsøkin til, at tað hevur verið hildið at vera neyðugt við eini slíkari serligari verju, er, at fólk, sum umboða almennar myndugleikar, eru í serligum vanda fyri álopi og tí hava tørv á eyka verju móti tí vanda fyri harðskapi og hóttanum, sum embætið hevur við sær, haruppií ótarnað at útinna sínar uppgávur.

Verjan fevnir m.a. um politistar, dómarar, fangavørðar, lærarar og námsfrøðingar á almennum og kommunalum stovnum, sjúkrarøktarfrøðingar, læknar, heilsufrøðilig starvsfólk, sosialráðgevar, málsviðgerar, kommunalar bussførarar og parkeringsvørðar.

§ 119 fevnir um føri, har nevndu fólk eru fyri harðskapi ella hóttanum um harðskap í arbeiðstíðini, ímeðan tey útinna tænastuskyldu ella starvsskyldu sína, eftir arbeiðstíð, tá ið viðkomandi má metast at útinna tænastuskyldu ella starvsskyldu sína, umframt eftir arbeiðstíð í sambandi við tænastuna.

Føroya Rættur frídømdi í februar 2020 persón, sum var ákærdur fyri brot á § 119, stk. 1, sum við harðskapi hevði gjørt seg inn á løgreglumann í tænastu. Í dóminum, dagfestur 3. februar 2020, var grundgevingin fyri frídømingini, at lógarteksturin var ikki nóg neyvur til, at ákærdi kundi revsast eftir ásetingini. Ítøkiliga metti rætturin, at orðini "overfalder nogen" ella "øver (vold)" í tveimum ymsum útgávum av donsku revsilógini, sum týtt varð úr, vantaðu í føroyska tekstinum. Rætturin legði dent á, at lógarheimildin fyri at døma fyri revsirættarlig brot mátti vera púra greið.

Í einum øðrum rættarmáli seinni í ár, har persónur varð ákærdur fyri brot á somu áseting, viðgjørdi professari í málfrøði eftir áheitan frá ákæruvaldinum í einum uppriti orðingina í § 119, stk. 1 í einum málsligum høpi. Niðurstøðan var, at "við harðskapi" er røtt týðing av "øve vold", og hevur sama týdning sum orðini: "tann, sum fremur harðskap". Rætturin metti tó ikki umrødda uppritið broyta metingina hjá rættinum av, at lógarheimildin fyri at revsa var ikki nóg greið. Eystari Landsrættur hevur staðfest hendan partin av dóminum.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Broytingin av ásetingini er ein málslig nágreining, sum hevur sum endamál at rudda burtur íkomnan iva um, hvat skilst við orðingina "við harðskapi".

Víst verður annars til serligu viðmerkingarnar til nr. 1 í løgtingsmáli nr. 108/2018 Uppskot til løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin)

Til § 2
Gildiskomuáseting.

Á Løgtingi, 1. september 2020

Bjarni Hammer